Fylgiskjal 4

Uttanríkis- og vinnumálaráðið

07. februar 2024

Hoyringssvar viðv uppskoti um løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fjarskifti

Elektron hevur fingið uppskot um broyting í lóg um fjarskifti til hoyringar.

Yvirskipað taka vit undir við uppskotinum, sum hevur til endamáls at betra um nettrygdina í Føroyum og byrgja fyri netálopum og skipa eina munagóða tilbúgving, í kann styrkja mótstøðuførið og avmarka avleiðingarnar, tá í álop henda.

Vit vilja vísa á, at av tí at Fjarskiftiseftirlitið við hesi broyting fær rættiliga víðar atgongdir til upplýsingar, dátur o.a. og sambært lóggávuni kann lata týðandi veitarum yvirskipað yvirlit yvir undirstøðukervi og sambond hjá øðrum týðandi veitarum, er neyðugt, at hetta verður gjørt soleiðis, at KT- og rakstrartrygdin ikki koma í vanda.

Tí vilja vit leggja áherslu á, at tey sum á onkran hátt taka lut í hesum arbeiði, verða undirløgd eina trygdargóðkenning og tað verður tryggja, at hesi ikki hava bindingar til aðrar stovnar, virkir ol. sum kann skaða gegni.

Mælt verður eisini til, at mannagongdir fyri arbeiðnum verður grannskoðað. Endamálið við tí er at eftirkannað, at tagnarskyldan viðvíkjandi hesum arbeiðið er intakt.

Vinarliga

Elektron

Ulla Joensen